# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Hátíðarhalda Astrid Lindgren




**Landsmiðstøðin fer í næstu viku at bjóða øllum børnum í 1., 2. og 3. flokki til upplestur av Lindgren-tekstum**

ASTRID LINDGREN 100 ÁR

Tann í gjár vóru 100 ár liðin, síðan Astrid Lindgren varð borin í heim, og tað vilja tey á Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð gera eitt sindur burturúr.

- Okkara gáva til Astrid Lindgren er samstundis ein gáva til øll børn í 1., 2. og 3. flokki: Vit ætla at halda dagin við at bjóða øllum næmingum í 1., 2. og 3. flokki til upplestur í viku 46. Sjónleikarar frá Tjóðpalli Føroya fara at lesa um Pippi Langsokk, Ronju og Birk, Emil úr Lønnibergi ella onkran heilt annan, sum Astrid Lindgren hevur skrivað um. Sýningin verður uml. 45 minuttir og vera í Suðuroynni, á Sandi, í Kollafirði, í Norðskála/Oyrar skúla, á bókasavninum í Klaksvík, í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag og í Norðurlandahúsinum, sigur Landsmiðstøðin í tíðindaskrivi.

Tá vikan er av, fara uml. 2100 børn at hava hoyrt um Pippi, Emil, Ronju, Dikku og øll hini, sum Astrid Lindgren hevur skrivað um tey seinastu 50 árini.

Tiltakið er ókeypis.

Landsmiðstøðin er ein stovnur undir Mentamálaráðnum, ið veitir tænastur í undirvísingarverkinum so sum at kunna um undirvísingartilfar, umsita savn við undirvísingartilfar til útláns, at ráðgeva og at skipa fyri eftirútbúgving fyri lærarar.

## Heilsuskaðiligar leikur

**TOP-TOY A/S, sum eigur leikahandlarnar BR Leikur og TOYS'R'US, tekur øll sløg av BINDEEZ-perlum inn aftur**

TÍÐINDASKRIV

Tær littu BINDEEZ-perlurnar kunnu brúkast til at gera ymisk skap og mynstur, og tá vatn verður sprænt á tær, hanga tær saman. Men nú vísir tað seg, at skeivt brúk av perlunum kann vera heilsuskaðiligt. Um børn svølgja perlurnar í stórum tali, kunnu tey vísa tekin um dølskni og svimbul og missa vitið. Tað kemst av, at perlurnar orsakað av framleiðslubreki innihalda evnafrøðiligt tilfar, sum elvir til júst hesi tekin. Í løtuni vita vit um nøkur fá dømi í øllum heiminum,har børn hava ment hesi sjúkutekin eftir at hava svølgt perlurnar.

Tí hevur TOP-TOY A/S longu tikið allar BINDEEZ-perlur av handilshillunum og beinanvegin steðgað søluni av teimum. TOP-TOY A/S tekur samstundis øll sløg av BINDEEZ-perlum innaftur, sum eru seld í handlum okkara.

Tey viðskiftafólk, sum hava keypt BINDEEZ-perlur, verða tí biðin um at lata perlurnar inn til nærmasta BR-handil ella TOYS-'R'US. Har kunnu viðskiftafólkini velja sær aðra vøru í staðin ella fáa goldnu pengarnar aftur.

TOP-TOY A/S er ein av størstu útbjóðarum í Norðurlondum av dygdarleikum til børn, og tryggleiki barnanna hevur fremstu raðfesting hjá okkum. TOP-TOY A/S virkar støðugt fyri at halda góða dygd og trygd viðvíkjandi vørum okkara. Vit vilja, at brúkarin altíð trygt skal kunna keypa leiku í handlum okkara.

Fleiri upplýsingar um BINDEEZ-perlur fáast hjá Jon Vastrup framleiðslutrygdarstjóra á telefon 46 16 36 56 ella teldupost: jva@top-toy.dk.

BR Leikur í Føroyum fylgja ávísingunum hjá TOP-TOY A/S. Viðskiftafólk ið hava fleiri spurningar í hesum sambandi, kunnu venda sær til Ritu D. Syderbø, stjóra í BR Leikur í Føroyum. Telefon nummari er 319929 Teldupost brleikur@post.olivant.fo

ALMENT HÁTÍÐARHALD




Leygardagin 17. november kl. 13.00 verður Strandavegurin alment tikin í nýtslu.

**Í hesum sambandi skipar Landsverk fyri almennum hátíðarhaldi í „Kafeteria" í ítróttahøllini á Skála.**

Skráin fyri dagin

**Á Strondum, við vegamótið oman fyri Hulk:**
Kl. 12.00 Lokalu ítróttafeløgini skipa fyri renning inn á Skála eftir nýggja vegnum.

**Á Skála, oman fyri ítróttaøkið:**
Kl. 13.00 Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, bjóðar vælkomin.
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sker snórin.

Bilafylgi koyrir eftir nýggja vegnum út á Strendur og aftur.

Aftaná bjóðar Landsverk øllum til alment hátíðarhald í „Kafeteria" í ítróttahøllini á Skála.

**Øll eru vælkomin.**

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land